Bjarni K. Petersen
løgtingsmaður

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)
(Ásetingin um gudsspottan verður strikað)

§ 1

Í revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 5. mai 2022 verður § 140 strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Endamálið við uppskotinum er at strika § 140 í revsilógini um gudsspottan. Sambært hesi áseting kunnu ávísar útsagnir (speireking ella háðan) um trúarlæru ella gudsdyrkan hjá lógligari trúarsamkomu her í landinum revsast við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir. Eingin er nakrantíð dømdur eftir ásetingini í Føroyum.

Eingin átrúnaður eigur at vera vardur móti atfinningum. Frælsa orðaskiftið er ein grundlógartryggjaður rættur, og bulurin í einum virkandi fólkaræði. Tí skulu vit hava so fáar avmarkingar í talufrælsi sum til ber.

At strika ásetingina styrkir talufrælsið og er í samsvari við tilmæli frá ST og Europaráðnum um, at tað ikki skal vera revsivert ikki at sýna virðing fyri eini trúarlæru ella gudsdyrkan.

Í Føroyum hava vit trúarfrælsi. Í Føroyum hava vit eisini talufrælsi og virðismeta rættin til at at siga sína meining, seta spurningar og finnast at, sama hvørji samfelagslig viðurskifti, talan er um. Átrúnaðir og trúarlærur, sama hvørjar tær eru, hava ikki tørv á serstakari verju móti útsagnum. Hvat speireking og háðan eru, fer altíð at vera ein tulkingarspurningur. Tað, sum ein sær sum atfinningar móti einum átrúnaði, kann ein annar síggja sum speireking og háðan.

Harafturat kann gudsspottan illa vera revsiverd, tí revsirættarliga krevst eitt offur ella ein órættaður, skal gerðin verða at rokna sum revsiverd. Speireking og háðan eru ikki rættaðar móti persóni ella felagsskapi, men heldur einum ávísum sjónarmiði ella heimsmynd.

Okkara grannalond hava ásannað hetta, og hava fleiri teirra avtikið ásetingina seinastu árini. Í størsta partinum av Evropa er gudsspottan ikki revsiverd longur, og hetta sama er galdandi fyri øll Norðurlond. Ásetingin um gudsspottan varð strikað Svøríki í 1970, í Stóra Bretlandi (undantikið Norður Írland) í 2008, í Norra og Íslandi í 2015 og í Danmark í 2017.

Í dag eru flestu londini við lóggávu móti gudsspottan at finna í Norðurafrika, Miðeystri og Eysturevropa. Hesi eru ikki lond, vit plaga at samanbera okkum við, tá talan er um trúar- og talufrælsi.

Útsagnir ella boðskapir, sum hava sum endamál at hótta, spotta ella eyðmýkja persónbólkar (og ikki sjálva trúarlæruna) orsakað av m.a. trúgv, verða framhaldandi revsiverdar sambært revsilógini.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
§ 140 í revsilógini um gudsspottan verður strikað. Sambært hesi áseting kunnu ávísar útsagnir (speireking ella háðan) um trúarlæru ella gudsdyrkan hjá lógligari trúarsamkomu her í landinum revsast við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir. Eingin er nakrantíð dømdur eftir ásetingini í Føroyum.

Útsagnir ella boðskapir, sum hava sum endamál at hótta, spotta ella eyðmýkja persónsbólkar (og ikki sjálva trúarlæruna) orsakað av m.a. trúgv, verða framhaldandi revsiverdar sambært revsilógini.

Til § 2
Gildiskomuregla.

Á Løgtingi, 7. oktober 2022

Bjarni K. Petersen